Skála-GÍ 1-2 (0-1):

# Lítil ferð í dystinum á Skála

**Skálamenn stríðast í botninum at sleppa av niðasta plássi. Seinasta vikuskifti fingu teir ein avsmurning í Havn móti B36, men annars eru flestu ósigrarnir teprir. Á heimavølli hava teir verið stinnir og fingið tveir javnleikir og annars oftast tapt við einum málið**

FÓTBÓLTUR
*Álvur Hansen*



*Gøtumenn menn skutu øll málini á Skála sunnudagin, men vunnu ikki meir enn 2-1 á botnliðnum.*
*Mynd: Samson Nesá*

Hesaferð høvdu skálamenn vitjan av GÍ og høvdu teir sett nøsuna upp eftir einum góðum úrsliti - minst einum stigi.

Gøtumenn hinvegin skuldu hava øll trý stigini fyri at hanga í tí javna toppstríðinum.

Liðini vóru bæði nakað skerd. Skála manglaði Dánjal Hansen og Jónhard Frederiksberg sum eru skaddir og Arnold Berg sum var uttanfyri við leikbanni. Hjá GÍ manglaðu skaddi Sámal Joensen og leikbannaðu Suni Olsen og Magnus Skoralíð.

### Misskiljing kostaði

Skála átti fyrsta stóra málmøguleikan eftir fýra minuttir. Teir høvdu hornaspark sum Alexandur Johansen sendi stutt til Alexandru Gabor, sum rann út ímóti horninum og móttekur bóltin og vendir móti málinum eftir sjálvari baklinjuni og rekur tætt inn undir málið áðrenn hann avsluttar og GÍ vejuleikari bjargar á sjálvari málstrikuni.

Tá níggju minuttir vóru leiktir leggur Súni Fríði Johannesen GÍ fram um 1-0. Bartal Eliasen spælir Krystof Popchynski leysan í høgru síðu, sum eftir eitt stutt trekk leggur flatt innfyri málið. Júst sum Eugin Voda í Skálamálinum skuldi taka bóltin kemur Skála verjuleikari í millum við fótinum, soleiðis at bóltin fór uppum teir báðar soleiðis at Súni Fríð Johannesen kundi seta høvdi á bóltin og beina hann í málið. Ein vandaleys støða sum eftir misskiljing gav mál.

Eftir málið var tað GÍ sum hevði bóltin mest. Fyrstu løtuna flyttu teir bóltin skjótt, men skálaverjan lá tøtt aftarlaga og bíðaði. Teir høvdu nokk lært av avsmurninginum í Havn seinasta vikuskifti. Onkri málmøguleikar vóru og átti GÍ teir flestu av hesum, uttan at nakað spurdist burtur úr hesum Ferðin á spælinum minkaði og gøtumenn høvdu framvegis bóltin tað mesta av tíðuni.

Men í 39. minutti mundi Skáli javnað. Alexandru Gabor sendi eitt gott fríspark úr 27 metra fjarstøðu framvið verjugarðinum á stongina.

### Áslakur gjørdi munin

Seinni hálvleikur var bert 3. minuttir gamal tá Skála javnaði. Kári Nielsen sparkar bóltin innum GÍ verjuna, har málverjin Hallur Hansen, slær bóltin burtur, men óheppin rakar beint á Bartal Eliasen, sum beinir bóltin í málið til javnleik 1-1.

Seinni hálvleikur var nú javnari og bæði liðini høvdu sínar málmøguleikar. GÍ átti kortini teir flestu og var tað serliga eftir deyðbóltsstøður at gørtumenn vóru vandamiklir. Tann allarstørsta átti Bárður á Lakjuni tá hann langaði eitt skot úr 18 metra fjarstøðu úr vinstru síðu. Men Eugin Voda í Skálamálinum hevði eina framúr bjarging tá hann mátti út í fulla longd. Hetta var annars fyrst landskappingardysturin hjá Bárði fyri GÍ eftir at hann í fyrru leikhálvu leikti fyri KÍ.

Í 21. og 22. minutti vóru tvær útskiftingar sum ávirkaðu spælið og úrslitið. Skála tók miðvallarin, Paula Hansen, sum var við fyri fyrstu ferð eftir drúgvan liðbandsskaða hann fekk fyrst í juni mánað. Uttan iva var hann ikki heilt klárur enn, men hann var besti maður hjá Skála meðan hann var á vøllinum. Eftir at hann fór út misti Skála takið á miðvøllinum sum teir als so spakuliga høvdu fingið hampuligt tak á.

Hjá Gí kom Áslakur Petersen á vøllin og hann fekk meiri tyngd á miðvøllin soleiðis at teir vunnu fleiri bóltar. Sera raskur og nógv við í uppbyggjandi spælinum. Og so var tað eisini Áslakur sum gjørdi sigursmálið.

Súni Fríð Johannesen leggur innfyri úr høgru. Skálamálverjin boksar útfrá. Magni jarnskor skallar móti málinum og dygst niðri við vinstra málstólpa fær Eugin Voda, enn einaferð í fullari longd, fingrarnar á bóltin. Tá er Áslakur Petersen fyrstur á returbóltinum og smekkar hann í málið til 2-1 til GÍ og 29 minuttir farnir av seinna hálvleiki.

Eftir hetta var tað Gí sum hevði bóltin mest og somuleiðis áttu størstu málmøguleikarnar.

2-1 sigur til GÍ, sum fekk tað teir fóru á Skála eftir hendan fagra sóldagin.

Skálamenn iðra seg uttan iva. Enn ein tepur ósigur og liðini omanfyri niðurflytingarstrikuna fáa stig, men enn eru bert trý stig upp til næst aftasta pláss.

**Dysturin í tølum**
Skála-GÍ 1-2 (0-1)
0-1 Súni Fríði Johannesen, 9
1-1 Sjálvmál, 48
1-2 Áslakur Petersen, 75

**Skála:** Eugin Voda - Ronnie Hansen, Áki Petersen, Rúni Rasmussen, Bent Djurhuus - Marius Joensen, Kári Nielsen, Pauli Hansen, Alexandur Johansen - Gheorge Callo Alexandru Gabor

**GÍ:** Hallur Hansen - Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Leivur Hansen - Henning Jarnskor, Magni Jarnskor, Jóan Petur Olsen, Zidek Janek, Bárður á Lakjuni - Krystof Popcynski, Súni Fríði Johannesen.

# Grannarnir býttu stigini

**Hvørgin partur kann brúka javnleikin til tað stóra**

2. DEILD MENN
*Páll Holm Johannesen*

Leygardagin var grannauppgerð í Fuglafirði millum ÍF og LÍF. Dysturin endaði við javnleiki 1-1, eftir at fuglfirðingar høvdu verið á odda 1-0 í hálvleikinum.

### Javnur dystur

Úr Fuglafirði siga tey at dysturin var gjøgnumgangandi javnur, og at úrslitið av dystinum tí var ein góð mynd av dystargongdini. Dysturin var ikki serliga væl leiktur, men leikferðin var høg, og bæði lið bardust manniliga.

Fleiri málmøgleikar vóru í dystinum til báðar partar, men tað komu ikki fleiri enn tey tvey málini.

Fyrra málið í dystinum kom í fyrra hálvleiki, og tað átti heimaliðið. Høgni Zachariassen skeyt hornaspark, sum varð snittað víðari til Rúna Petersen, ið ótarnaður kundi leggja ÍF frammum.

Leirvíkingar svaraðu aftur í seinna hálvleiki, tá Petur Sjúrðaberg fekk javnað. Eftir at ÍF-verjan ikki fekk bóltin burtur, kom Petur at standa væl fyri inni í ÍF-brotsteiginum, og LÍF-framherjin kundi lættliga seta bóltin framvið ÍF-málverjanum til 1-1.

### Keðiligt úrslit fyri báðar partar

Hvørgin partur kann brúka javnleikin til tað stóra í stríðum um uppflyting. Týdningurin av dystinum var stórur fyri bæði Eysturoyar liðini, sum bæði royna fylga við í kappingini um uppflyting í fremstu deildina. Úr Fuglafirði verður at sagt at stóri týdningurin av dystinum allarhelst, var høvuðsorsøkin til, at leikliga flogið yvir dysturin var so sum so.

Tó so bæði lið tóku við javnleikinum eitt stig inná sumbingar, sum tapti sín dyst um vikuskiftið. ÍF og LÍF eru í løtuni ávikavist 4 og 3 stig frá sumbingum.

Fuglfirðingar hava ein dyst eftir á heimavølli eftir ímóti sumbingum, og tá skulu teir helst vinna. Komandi vikuskiftið spælir ÍF í Gundadali ímóti B36, og tá kravið einfalt- einki annað enn trý stig.

Leirvíkingar stóðu seg væl í fyrru helvt, men í seinnu helvt hevur gingið heldur striltið. Liðið hevur bert megnað at fingið eitt stig úr møguligum seks. Komandi vikuskiftið koma klaksvíkingar um fjørðin á vitjan, og tá fáa leirvíkingar møguleika at rætt uppá gongdina seinastu dystirnar.

**Dysturin í tølum:**
ÍF-LÍF 1-1 (1-0)
1-0 Rúni Petersen
1-1 Petur Sjúrðaberg



# B36 vann aftur hetta vikuskiftið

**Sumbingar eru nú seks stig aftanfyri FS Vágar, og B36 hevur vunnið seg uppá triðja pláss í aðru deild**

2.DEILD MENN
*Jákup Mørk*

2. lið hjá B36 vann aftur hetta vikuskiftið ein torføran útidyst. Seinasta vikuskiftið vann árstalsfelagið heima á Sandi, og hesuferð stóðu sumbingar fyri skotum. Í góðveðrinum á Krossinum í Sumba vann B36 við einum máli ímóti ongum.

### Javnur fyrri hálvleikur

Í fyrra hálvleiki leikaði javnt á, og mesta av spælinum fór fram á miðjum vølli. Báðir partar høvdu eisini torført við at spæla seg fram til rættiligar málmøguleikar í fyrra hálvleiki.

Tó so, einaferð kom Sumba-framherjin, Eirikur Joensen, at standa brendi inni á fimm-metrinum, men hann brendi stóra møguleikan. B36 hevði eisini ein stóran møguleika miðskeiðis í hálvleiki, eftir at sumbingar ikki fingu bóltin burtur, men B36-leikaran fekk ikki skot á.

Sumbingar høvdu eisini nøkur skot útifrá, men antin stóð B36-málverjin, Magnus Poulsen, teimum í vegin, ella fóru skotini við síðurnar av málinum.

Hálvleikstøðan var 0-0, og hetta var góð mynd av dystargongdini, har bæði høvdu líka nógv spæl, og har hvørgin partur skapti teir stóru málmøguleikarnir.

### Eyðun avgjørdi

Í seinna hálvleiki loysnaði eitt sindur upp, og spælið gjørdist meira ágangandi frá báðum pørtum. Ágangandi spælið hevð eisinivið sær, at fleiri møguleikar vóru á bæði mál.

Eyðun Højgaard hevði stóran møgleika fyri gestirnar miðskeiðis í seinna hálvleiki, tá hann varð leysur við málverjanum, men Sumba-málverjin bjargaði.

René Thomsen hevði eisini eina naska roynd á B36 málið tíðliga í seinna hálvleiki, men Magnus Poulsen stórbjargaði.

Sum hálvleikurin gekk, mundu áskoðararnir helst ásannað, at talan var um ein málleysan dyst, men seks minuttir fyri leiklok, fall einasta málið í dystinum. Bergur Midjord fær eina langa sending, sum hann ímillum fleiri Sumba-verjuleikarar fær fatur á, og finnur hann ein leysan Eyðun Højgaard, sum kundi leggja B36 á odda.

Tað, sum var eftir av dystinum royndi Sumba at trýsta, men B36´arnir hildu fast, og kunnu fegnast um at fáa fulla úrtøku úr torføra útidystinum á Krossinum.

Hjá sumbingum ósigurin dátt við, tí nú eru seks stig upp til oddaliðið, FS Vágar, og samstundis eru hini liðini farin at nærkast sumbingum. Nærmastu kappingarneytarnir til upp- og niðurflytingar dystirnar, eru B71 og LÍF, sum bæði hava 15 stig – trý færri enn Sumba.

Fyri B36 hevði sigurin við sær, at havnarliðið nú er á einum býttum triðja plássi við NSÍ. Fyri tveimum umførum síðan lá B36 á næstniðasta plássi, og eftir tveir sigrar er teri nú endaðir á triðja plássi. Hetta sigur avgjørt nakað um hvussu javnt tað er í aðru deild í løtuni.



*B36 vann óvæntað á Krossinum, og liggur nú nummar trý í aðru deild, meðan sumbingar við ósigrinum hava mist samband við oddaliðið FS Vágar, sum er seks stig frammanfyri sumbingar*
*Mynd Savnsmynd*

**Dysturin í tølum:**
<u>**Sumba-B36 0-1 (0-0)**</u>
0-1 Eyðun Højgaard

# John Arni og Flóvin í Hollandi

**Tveir teir fremstu føroysku telvararnir í løtuni, John Arni Nilssen og Flóvin Tór Næs, royndu seg í seinastu viku í sterkari kapping í Hollandi**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Báðir høvdu teir frískar IM-normar í skjáttuni, sum kanska hevur lagt eyka trýst á herðar teirra, men eisini eigur hetta at geva teimum sjálvsálit og trúnna uppá fleiri IM normar. Talvsteðgurin hjá John Arna Nilssen og Flóvin Tór Næs hevur ikki verið langur. Seinast í juli mánaða luttóku teir í Politiken Cup, og heilt stutt framanundan ognaði Flóvin sær jú ein IM-norm í Týsklandi. Kanska hevur troyttleiki tí spælt ein leiklut hjá Flóvini í kappingini í Hollandi.

John Arni fekk eina keðiliga byrjan, tá hann í 2. umfari óvæntað tapti móti væl lægri styrkismettum telvara. Men hann reistist og telvaði upp til sína rating (2397), og heldur sítt ratingtal nøkunlunda.

Flóvin fekk somuleiðis eina ivasama kappingarbyrjan, og hann reistist ikki heilt fyrrenn seinastu tvey umførini. Men ratingtal hansara (2317) fekk eitt skrædl, har hann missir útvið 50 ratingstig.

### Endaliga støðan í Hogeschool Zeeland

1-2 GM Nijboer . . .7,5 / 9
1-2 GM Gyimesi . . . . .7,5
3 GM Tiviakov . . . . . .7
8 John A. Nilssen . . .6,5
33 Flóvin T. Næs . . . .5,5

John Arni møtti tveimum tittulhaldarum, GM Tiviakov (fekk javnt ímóti honum í Politiken Cup), sum hann tapti ímóti, og IM Werle sum hann í seinasta umfari býtti stigið við. Hinir mótstøðumennirnir lógu allir um 1850-2150 í rating. Flóvin fekk nærum eins og nógv stig sum John Arni, men mótstøðan var væl veikari. Tann lægsti hann hitti hevði umleið 1820 og tann sterkasti 2135. Vónandi fer henda kapping skjótt í gloymibókina hjá Flóvini, soleiðis at hann kann hugsa um komandi kappingar og avbjóðingar. Eitt nú Talvolympiaduna, sum verður í oktober mánaða.

Enn frættist tó ikki um Flóvin verður við ferðalagnum. Á bíðilista stendur eitt nú havnarmaðurin Jóan Hendrik Andreasen, sum er klárur at traðka til um Flóvin gevur avboð.

### Íslandssúlan 2002

Telvað verður um íslandssúlusteypið í Klaksvík í ár. Higartil hava 17 telvarar boðað frá luttøku, og talan er um eina spennandi manning, sum tó ikki er so sterk sum vónað varð.

Enn kann ein tekna seg við at vitja heimasíðuna <u>www.talvkapping.subnet.dk</u>, og harfrá tekna seg, ella møta upp á Ósaskúlanum hósdagin 15. august kl. 18.00, tá kappingin fer av bakkastokki. Virðislønirnar eru methøgar, og umstøðurnar sera góðar at telva í.

Telvað verður seks umfør í døgunum 15-18. august.

**Fyribils luttakaralisti:**
Ólavur Simonsen
Carl Eli. N. Samuelsen
Terji Petersen
Olaf Berg
Herluf Hansen
Tummas M. Anthoniussen
Ingolf Gaard
Esbern Christiansen
Vagn Heldarskarð
Rani Baldursson
Jan Simonsen
Rógvi Mortensen
Rógvi Dragaberg
Danny Baldursson
Herborg Hansen
Ingi Isaksen
Bjørn E. Thomsen

### Glímingin við GM Tiviakov

John Arni hevur sitið yvir av GM Tiviakov úr Hollandi (upprunarliga russi) tveir reisir innan 3 vikur. Fyrstu ferð varð í Politiken Cup, tá hann við hvíta fólkinum lættliga helt javnt, og nú í Hollandi, har hann við svarta fólkinum ikki megnaði sama kynsturin.

Bæði talvini eru við í blaðnum í dag.

**John Arni Nilssen (2363) – GM Tiviakov (2628)**

***Politiken Cup (3), 17.07.2002***

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 4.g3 c5 5.Rif3 cxd4 6.Rixd4 0-0 7.Bg2 d5 8.cxd5 Rixd5 9.Fb3 Ria6 10.0-0 Rixc3 11.bxc3 Be7 12.Rd1 Ric5 13.Fc4 e5 14.Ba3 Fa5 15.Bxc5 Fxc5 16.Fxc5 Bxc5 17.Rib5 a6 18.Rid6 Ra7 19.Rixc8 Rxc8 20.Rd7 b5 21.Rxa7 Bxa7 22.Rd1 Kf8 remis

**GM Tiviakov (2628) – John Arni Nilssen (2397)**

***HZ Vlissingen (6), 08.08.2002***

1.e4 c5 2.Ric3 Ric6 3.Bb5 e5 4.d3 d6 5.f4 exf4 6.Bxf4 Rif6 7.Rif3 Be7 8.0-0 0-0 9.Bxc6 bxc6 10.e5 (stórmeistarin hevur longu eftir 10 leikum nokkso einfalt telvað seg til eina betri støðu) 10...Rid5 11.exd6 Bxd6 12.Bxd6 Rixc3 13.Fe1 Fxd6 14.Fxc3 (einasti veikleiki hjá John Arni er dupultfinnan. Og tað er nokk hjá Tiviakov at gera sær dælt av) 14...Be6 15.Fe5 Fd5 16.b3 Rae8 17.Rae1 f6 18.Ff4 Fd7 (John Arni verjir seg væl, og hollendarin má stríðast fyri sakina, tí lætt er tað ikki) 19.h3 Bd5 20.Rid2 Bf7 21.Ff2 Fd4? 22.Re4! Fb2 (John Arni hevur ikki sæð vandan. Frúgvin er nevniliga innilæst) 23.Fxc5 Bd5? DiAGRAM [23...Rxe4 var seinasti møguleiki, men svarta støðan er kortini ikki nóg sunn] 24.Rb1 Fxa2 25.Ra4 Fxb1+ 26.Rixb1 Re1+ 27.Kh2 Og John Arni valdi at gevast. 1-0

Áðrenn 24.Rb1